## Føroysk lið tóku seg fram

Havnar Fimleikafelag og Støkk tóku um vikuskiftið lut í HM-kappingini í estetiskum fimleiki. 28 lið vóru við í kappingini, og føroysku feløgini gjørdust ávikavist nummar 22 og 24. Havnar fimleikafelag fekk 18,80 stig og Støkk fekk 17,50 stig. Vinnandi liðið varð estlendska GC Janika, sum vann framman fyri bulgarska landsliðið.



## Heilsurenning hvønn mikudag

Frá mikudegnum komandi fer Bragdið at skipa fyri heilsurenning. Hendan verður hvønn mikudag klokkan 19, og verður byrjað á parkeringsøkinum við Hotel Føroyar. Tað er eingin treyt í sjálvum sær, at runnið verður allan vegin, so talan er eisini um tiltak til teirra, sum bara vilja hava ein góðan gongutúr. Hóast tað er felagið Bragdið, sum skipar fyri tiltakinum, so verður sagt, at øll eru hjartaliga vælkomin.

Skála-EB/Streymur 2-1 (1-1):

# Streymslit í Sundalagnum

**Nærlagni, ídni og ágrýtni hjá heimaliðnum virkaðu við til, at EB/Streymur, sum tað ikki stemmar hjá í løtuni, fór av Skála við ongum**

*Skála*

*EB/Streymur*

**FÓTBÓLTUR**
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*Ikki minst vóru teir hjá Skála hvassari í nærdystunum, enn gestirnir frá EB/Streymi vóru tað*

*Mynd: Sofus D. Johannesen*

Eftir flúgvandi fyrstu umfør, síðani John Petersen tók um róðrið á Skála, hevði tað ikki gingið nakað serligt trígjar tær seinastu ferðirnar. Eftir javnleik í Gundadali ímóti B36 og trivaligt tap ímóti HB og heimatap ímóti NSÍ var spurningurin á Skála, hvussu tað stóð til eftir landsliðssteðgin.

Avrikið ímóti oddaliðnum EB/Streymi vísti, at pílurin framvegis vendir rætta vegin. Hugburðurin var fínur. Skála spælararnir ofraðu seg fyri liðnum og hvørjum øðrum. Teir arbeiddu eitt sindur meiri og eitt sindur harðari enn mótstøðumenninir, og tað var ikki frítt, at tað eisini leikliga hekk betri saman hjá heimaliðnum.

2-1 sigurin var tepur, men hann var natúrlig avleiðing av gongdini.

Hjá varðameistarunum riggar tað ikki so væl, sum tað gjørdi í fjør, tá ið meistaraheitið so ógvuliga leingi var á stokkinum, og EB/Streymur vísti satt meistaraspæl.

Framrættaða spælið flýtur ikki, sum tað gjørdi í fjør. Sentralu miðvallararnir hava ikki eins lætt við at varðveita bóltin, og sambandið millum keturnar er ikki so tætt og væl skipað, sum tað plagdi at vera. Í staðin fyri gjøgnumspæld álop við hugflogi og eftir skipaðum mynstri, verður ov ofta sparkað ov langt og óskipað.

Hesa ferð var Arnbjørn Hansen, sum higartil hevur sitið beinskaddur uttanfyri, í fremstu ódnini, og tað var hann, sum legði EB/Streym á odda miðskeiðis í 1. hálvleiki. Eftir stóra misskiljing í miðverjuni vísti ungi maðurin, at máltevið er intakt, hóast skaðasteðgurin hevur verið langur.

Tað er týdningarmikið fyri EB/Streym, at Arnbjørn Hansen er komin so mikið fyri seg, at hann er førur fyri at spæla. Men tað restar framvegis nógv í, áðrenn tað aftur fer at streyma hjá Piotr Krakowski og hansara monnum. Sorin Anghel í fullgóðari útgávu hevði sjálvandi gjørt stóran mun. Men tað er heldur ikki so neyvt og trygt í verjupartinum, sum tað plagdi at vera.

### Skála betri fyri

Hóast gestirnir løgdu seg framum, so misti heimaliðið ikki stevið. Pætur Dam Jacobsen og Levi Hanssen eru óførir stríðsmenn á miðvøllinum. Tað er Pauli G. Hansen eisini, og hann vísti eisini hesa ferð, at hann er sannur meistari í at lesa spælið. Alexandur Johansen var aftur hesa ferð snildur í vinstru, inntil hann varð avloystur av Slavisa Kaplanovic, sum ikki tykist megna at vinna sær pláss millum teir fyrstu ellivu.

Skálamenn høvdu fokus á hvørjum nærdysti, teir vunnu flestu returbóltarnar, og í álopspartinum hekk tað betri saman hjá teimum. At teir skoraðu tvær ferðir og harvið tryggjaðu sær øll stigini kom ikki óvart á. Longu frammanundan EB/Streyma málinum høvdu teir havt bóltin í málinum aftanfyri René Tórgarð, men tá kolldømdi dómarin.

Sjey minuttir undan kærkomnu hvíldini í dýrdarveðrinum, bríkslaði dómarin fyri brotssparki til heimaliðið. Dómurin var fyri hands ímóti Marna Djurhuus. Tað verður altíð samrøðuevni, um brotsspark skal dømast í tílíkum førum. Alexandur Johansen syrgdi fyri fullari nyttu burturúr dóminum, og í 2. hálvleiki tóktist tað vera spurningur um tíð, áðrenn heimaliðið fór at fáa leiðslumálið.

Obi var í fremstu ódnini meistari í at halda upp á bóltin, meðan hann bíðaði eftir viðspælarunum. Eitt korter undan leikloki fekk hann í borðinum og eftir langa sending bóltin av Egili á Bø. Innskifti Kaplanovic lat innleggið fara til púra blanka Boga Gregersen, og arbeiðssami maðurin, sum so ofta hevur havt marginalirnar ímóti sær seinastu tíðina, gjørdist dagsins hetja á Skála.

EB/Streymur royndi at flyta tunga arsenalið fram, og teir vóru síðstu løtuna vandamiklir í sambandi við onkrar deyðbóltsstøður, men tað eydnaðist Hans Jørgensen og verjuni at halda streyminum burtur. Í løtuni er EB/Streymur ikki, sum oddaliðið nógva av árinum í fjør var, og í løtuni er Skála í útgávu, sum kann lyfta teir upp millum liðini, sum kappast um heiðursmerkini. Har sum EB/Streymur framvegis er!

### Skála er betri skipað

Miðvallarin og liðformaðurin hjá Skála, Pauli G. Hansen, var stak væl nøgdur efti stríðið í sumarveðrinum:

- Vit spældu betri, vit stríddust meiri, og tað hevði serligan týdning, at vit vóru fyrri á returbóltunum, enn teir vóru tað.

Tit hava síðstu vikurnar tapt móti bæði NSÍ og HB. Hvør var munurin á avrikinum hesa ferð, og so á avrikunum tær báðar ferðirnar?

- Tað hevði stóran týdning, at vit hesa ferð vóru betri skipaðir. Vit hildu okkum ti avtalurnar og fokuseraðu upp á okkara spæl. Tað bar við sær, at vit komu til møguleikar og skoraðu, og at vit hildu teimum burtur frá møguleikum, heldur Pauli G. Hansen.

### Betri tilfar og verri spæl

Egil á Bø er liðformaður á felagsliðnum EB/Streymi. Mikukvøldið skulu hann og liðfelagarnir aftur á Skála at spæla hálvfinalu í steypakappingini:

- Hetta var ikki nóg gott. Um vit skulu í steypafinaluna, er tað neyðugt við betri avriki mikukvøldið. Tað hongur ikki nóg væl saman, og so fella vit til at sparka meiri og spæla minni.

Tilfarið tykist vera gott?

- Vit hava helst betri fólk enn í fjør, men enn hava vit ikki fingið fulla nyttu burturúr tí. Sorin verður saknaður, men tað er ikki øll frágreiðingin, staðfestir Egil á Bø.

Hesa ferð sótu John Heri Dam og Gert Hansen uttanfyri. Gert varð smáskaddur undir venjing fríggjakvøldið, men hann hevði boðað frá, at hann var tøkur. Venjarin valdi tó at hava Brian Olsen á høgra vongverja, og hann stóð seg væl. John Heri Dam hevur verið burturstaddur, men hesa seinastu vikuna hevur hann vant.